Kunngerðablaðið A

2020 Givið út 17. januar 2020

Nr. 1 13. januar 2020

**Kunngerð**
**um**
**duravørðar**

Við heimild í § 13, stk. 3 í løgtingslóg nr. 183 frá 21. desember 2018 um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin) verður ásett:

**§ 1.** Loyvi at virka sum duravørður er treytað av, at viðkomandi lýkur krøvini í § 13, stk. 2, nr. 2-3 í matstovulógini.

*Stk. 2.* Loyvisnevndin kann frá politinum fáa upplýsingar um tey í stk. 1 nevndu viðurskifti.

*Stk. 3.* Loyvi at virka sum duravørður er harumframt treytað av, at duravørðurin kann skjalprógva at lúka førleikakrøvini í § 2.

**§ 2.** Tann, ið søkir um loyvi at virka sum duravørður, skal hava prógv í fyrstuhjálp og prógv í at nýta alla vanliga eldsløkkingarútgerð.

*Stk. 2.* Umsøkjarin skal vera kunnugur við viðkomandi reglur, t.d. matstovulógina, løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka og politiviðtøkurnar.

*Stk. 3.* Loyvisnevndin kann veita undantak frá førleikakrøvunum í stk. 1, um umsøkjarin hevur viðkomandi útbúgving ella starv.

**§ 3.** Loyvisnevndin kann geva einum umsøkjara fyribils loyvi at virka sum duravørður, um tað ikki ber til at lúka førleikakrøvini í § 2, stk. 1 vegna vantandi útboð.

*Stk. 2.* Fyribils loyvi eftir stk. 1 kann í mesta lagi latast fyri 12 mánaðir.

**§ 4.** Tann, ið setur duravørð í starv, skal veita duravørðinum arbeiðsklæði, har tað týðiliga sæst, t.d. við at prenta orðið Duravørður á klæðini, at viðkomandi er duravørður.

*Stk. 2.* Tann, ið setur duravørð í starv, hevur ábygd av at tryggja, at duravørðurin kennir rýmingarleiðirnar og dugir at brúka alla eldsløkkingarútgerð á staðnum.

**§ 5.** Duravørðar skulu, meðan teir eru til arbeiðis, hava samleikaprógv uppi á sær og skulu, eftir umbøn, vísa gestum og myndugleikum hetta.

**§ 6.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 13. januar 2020

**Helgi Abrahamsen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen (sign.)